# Sóljugarður

**Leygardagin varð nýggi dagstovnurin í Sandavági alment latin upp. Móttøka var seinnapartin, og nógv fólk nýtti høvi at støkka inn á gólvið at síggja snotiliga bygningin**

BLÓMUTÍÐ

*Orð og myndir:Edvard Joensen*



*Tað er sera spennandi at kanna alt tað forvitnisliga, sum er at síggja og uppliva ein slíkan dag í nýggjum umhvørvi*

**Sandavági:**
Sóljugarður eitur nýggi dagstovnurin hjá Sandavágs Kommunu. Hann varð alment tikin í brúk við móttøku seinnapartin leygardagin.

Tað blómar í Steigabønum. Alt uttan um okkum stendur í besta blóma, nú summarið er upp á tað hægsta, og tíðin er ljósast á árinum.

Tað er nógv fólk á gongd. Tey halda øll at sama máli. Teirri nýggjastu blómuni í bønum. Nýggja dagstovninum, sum í dag alment skal takast í nýtslu. Og ikki minst spennandi tykist hjá fólki at fáa at vita, hvussu stovnurin fer at eita.

Alt er gjørt til reiðar, og at vertirnir hava roknað við nógvum fólki, sæst beinanveg, ein kemur inn. Tað er Hotel Vágar, sum hevur staðið fyri borðreiðingini.

Fólk ganga kring í húsinum og hyggja seg um. Skilligt er, at húsið er gjørt til endamálið. Alt í einari hædd. Nógvar úthurðar og vindeygu, eins og ljósir litir eru brúktir allastaðni. Tað er lætt fyri andanum, hóast heilt nógv fólk er inni.

Arkitektarnir báðir á West Tech, Poul Arni Jacobsen og Jákup á Stongum, hava fingið væl burturúr, eru fólk samd um.

Bygningurin er bygdur upp um eina miðhøll við útloyparum í hvør sínum heraðshorni. Úthurðar eru bæði í teimum ymsu hornunum og í miðjuni, so lætt er at sleppa til og frá.

Rósa Samuelsen, borgarastjóri í Sandavági, fegnaðist í røðu síni um, at dagurin nú endiliga var komin, tá dagstovnurin alment kundi takast í nýtslu, og lykilin handast leiðaranum.

Hon greiddi frá gongdini í málinum, og nevndi tey, sum við høvdu verið frá byrjan.

Hon nevndi eisini tey, sum hava staðið fyri byggingini, og var talan burturav um fólk og virki í Vágum.

Síðan tók hon eitt sindur í sjálva byggingina og kostnaðin av stovninum, nú flutt verður inn.

Hóast bygningurin sjálvur verður tikin í nýtslu, er ikki alt liðugt uttanfyri, vísti borgarstjórin á.

Dagstovnurin liggur í sera barnavinarligum umhvørvi í Steigabønum niðan við Stórá, og ætlanin er at gera tað enn meira vinarligt við at planta trø rundan um í samstarvi við Skógrøkt Landsins, segði Rósa Samuelsen.

Stovnurin kostar, sum er, góðar seks milliónir krónur, segði borgarstjórin. Og tá liðugt er at gera uttanum, fer kostanðurin at liggja um hálvasjeyndu millión, segði hon.

Eftir at borgarstjórin hevði handað leiðaranum lykilin til dagstovnin, varð kunngjørt, hvussu stovnurin eitur.

Navnakapping hevur verið, og trý uppskot vóru við tí navninum, avgjørt varð at geva stovninum. Sóljugarður. Vinnararnir vóru allir úr Sandavági.



*Vinnararnir av navnakappingini. Frá vinstru Belinda Johansen, Karin Johannesen og Andrias Nielsen saman við borgarstjóranum, Rósu Samuelsen*



*Poul Arni Jacobsen og Jákup á Stongum hava teknað snotiliga dagstovnin í Sandavági. Stórur dentur er lagdur á ljósið*



*Formaðurin í Pedagogfelagnum, Carita Bjørklund, heilsar upp á leiðaran í Sóljugarði, Hervør Olesen, og yngsta alva hennara*



Nordvesten:

# Mentunarleiðari á motorsúkklu

**Millum gestirnar á Nordvesten í Klaksvík og Fuglafirði fyrst í juli, verður mentunaleiðarin í Tynset í Noregi. Hansara frítíðarítriv er motorsúkklur, og hann kemur hendanvegin á síni súkklu**

NORDVESTEN 2003

*Solby A. Eliasen*



*Her eru allar tíggju motorsúkklurnar avmyndaðar framman fyri vetrarpalassinum hjá russiska zarinum. Hetta millum annað er tað, sum mentunaleiðarin í Tynset í Noregi fær frítíðina at ganga við*

Jon Ole Hokstad er farin um tey seksti. Hann má sigast at hava eitt heldur øðrvísi frítíðarítriv fyri ein mann á hansara aldri. Hann er ein av 10 limum í einum motorsúkklubólki, sum heldur til í Tynset í Noregi. Hesin bólkurin kallast Kjeller´n MC, og hesir hava allir hvør sína motorsúkklu, sum teir hjúkla um gjøgnum veturin.

Og hóast hann kemur sum tann einasti til Føroyar úr hesum motorsúkklubólkinum, so tekur Jon Ole Hokstad sína motorsúkklu, ein Roial Enfield frá 1949 úr India, við.

Teir hava fyri stuttum koyrt ein túr niður til St. Pætursborg í Russlandi. Ein teinur upp á 2.148 km. Túrurin gekk upp á stás hjá teimum øllum, og teir komu fram í øllum góðum.

Jon Ole Hokstad sigur, at tað var eitt ótrúligt upplivilsi at koma koyrandi eftir høvuðsgøtuni í St. Pætursborg. Henda gøtan er 4 kilometrar til longdar, og teir steðgaðu við vetrarpalassið hjá zarinum.

Jon Ole er ein fittur, hugnaligur og skemtiligur maður, sum hevur upplivað eitt sindur av hvørjum. Fleiri ferðir hevur hann ferðast, har tummilin hevur verið "ferðatólið", og hann er ikki bangin fyri at royna nakað nýtt og spennandi

Umframt at vera mentunarleiðari í Tynset, so er hann eisini limur í stýrisbólkinum fyri Nordøsterdalen til hesa Nordvestenstevnuna.

Sambært stýrisbólkinum so gleða norsku gestirnir seg avbera nógv til at koma til Føroyar. Fleiri av teimum hava ikki verið í Føroyum áður, og í skrivi til Klaksvíkar kommunu siga tey, at fyri tey, sum búgva í Nordøsterdalen er tað nakað heilt serligt at kunna koma til Føroyar, sum hava sjógv rundan um seg.

– Vit búgva so langt vekk frá havinum, sum tað ber til í Noregi, so vit eru sera spent, siga tey í stýrisbólkinum.

Úr Nord-Østerdalen, sum fevnir um býirnar Folldal, Alvdal, Tynset, Os, Tolga og Røros koma eini 250 fólk. Har verða fólkatónleikarar og dansarar, ungdómssjónleikarabólkur, sum fer at framføra ein lítlan leik, listamálari og eitt hornorkestur. Somuleiðis verða normenn eisini umboðaðir á máltinginum, sum er høvuðsheitið á Nordvesten í ár. Tað koma tveir normenn við at halda fyrilestur um tað norðurlendska málið.



*Stýrisbólkurin í Nord-Østerdalen her avmyndaður. Jon Ole Hokstad er nummar tvey frá vinstru. Hann saman við øllum hinum normonnunum gleðir seg avbera nógv at koma til Føroya. Fleiri hava ikki verið her áður*

# Ford Mondeo ST220 - sportbilur við 226 hk

**Hjá P/F Wenzel fingu teir í farnu viku ein Ford Mondeo ST220 við 226 hk motori. Hóast bilurin hevur sama karrossarí sum ein vanligur Mondeo, er hann heilt annarleiðis við meira sportligum koyrieginleikum og útgerð**

BILAR

*Magnus Gunnarsson*

Hóast Ford Mondeo fæst í fleiri útgávum, sum allir hava sporligar koyrieginleikar, er ST220 nakað fyri seg. Undirvognurin er heilt annarleiðis uppbygdur, bilurin er senkaður og hevur stramma fjaðraskipan. ST220 er stúttur at koyra, 18" lágprofildekkini og undirvognurin arbeiða væl saman. Hann virkar ikki harður, hóast strammu avfjaðringina. Saman við 3,0 litur V6 motorinum við 226 hk er tað ein serlig upplivilving at koyra bilin, har alt er tilpassað hvørt eftir øðrum, motorurin, undirvognurin og setrini. Bilurin hevur yvirskot av kraft uttan á nakran hátt at virka óstórsligur. ST220 er sera ljóðleysur, bæði í tomgongd og tá hann kemur upp í ferð. Eisini er hann væl ljóðdoyvdur, so lítið hoyrist til motorin og hjólini inni í kabinuni.

At síggja til er bilurin eyðkendur av 18" hjólunum, tveimum útstoytum og spoilarum aftan, framman og undir hurðunum. Innan er alt í sportligum stíli við t.d. leðurkløddum Recarosetrum, klimaanleggi, fartpiloti og nógvum innbygdum trygdarskipanum. Bilurin koyrir frá 0-100 uppá 7,4 sek. og toppferðin er 243 km/t. Bilurin kostar 440.000 krónur og kann síggjast hjá P/F Wenzel til hósdagin 26. juni.

